[Endurlýsing]

# Set tíni fingramerki á føroyska bygging

## Deildarleiðari til bygningadeildina á Landsverki

Vilt tú bjóða tær sjálvum av og seta varðar eftir teg við stórverkum og stásiligum bygningum, so letur Landsverk dyrnar upp fyri tær við einum spennandi og avbjóðandi starvi sum deildarleiðari á bygningadeildini.

**Høvuðsuppgávur**
Saman við dugnaligum starvsfeløgum verður tú við til at:
- greina og raðfesta nýbygging og viðlíkahald við atliti at funktionaliteti, estetikki og góðsku.
- góðkenna verkætlanir og taka støðu til møguligar broytingar, umframt viðgera onnur byggimál, har bygging, bygningar, lendi og formlist eru partur av viðgerðini.
- uppbyggja ein politikk fyri almenna byggilist.
- fyrireika og samskipa landsbyggireglugerð fyri Føroyar.
- menna eitt kreativt arbeiðsumhvørvi.

**Førleikakrøv**
Tú ert útbúgvin arkitektur, byggifrøðingur, verkfrøðingur ella líknandi. Leiðsluroyndir og aðrar royndir frá verkætlanum í byggivinnuni er ein fyrimunur. Vit leggja dent á dygd og góðar loysnir, og vørumerki títt er tískil dugnasemi og nærlagni, har tú sum arbeiðsfúsur viðleikari gevur títt íkast til arbeiðsplássið og ta røttu byggingina.

**Setanartreytir**
Løn og setanartreytir annars eru sambært sáttmálanum millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

**Umsóknir**
Umsóknir við prógvum og lívsgongdarlýsing (cv) verða at senda til lv@lv.fo ella til Landsverk, postsmoga 78, 110 Tórshavn, og skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 25. mars, 2008. Merk umsóknina „Deildarleiðari bygningadeildin“ og viðmerk í umsóknini, hvar tú hevur sæð starvslýsingina. Umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Fleiri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Oyvind Brimnes, stjóra, á 540 801 ella ob@lv.fo.



SENDISTOVAN

*Landsverk er stovnur undir Vinnumálaráðnum og hevur um hendi vega- og havnamyndugleikauppgávur og byggiharrauppgávur. Stovnurin ráðleggur og ger ætlanir, útinnir, rekur og viðlíkaheldur landsvegir, havnir, bygningar og flogvallarmál, herundir tyrlupallar.*

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, Tórshavn, | Tel 340 800, Faks 340 801, lv@lv.fo, www.landsverk.fo

LANDSVERK byggir land



[Endurlýsing]

# Betong skapar eisini bleyt virðir

## Landsverk søkir eftir verkfrøðingi ella byggifrøðingi til framleiðsludeildina

Hørðu virðini sum vegir, tunlar og brýr eru á mangan hátt ein fyritreyt fyri at kunna røkja bleytu tænasturnar í samfelagnum. Vilt tú útbyggja og viðlíkahalda samfelag okkara á báðum hesum økjum, hevur tú møguleikan nú. Vit kunnu bjóða eitt spennandi og áhugavert starv, ið er fakliga og persónliga mennandi og við góðum arbeiðsumstøðum.

**Arbeiðsøkið**
Í høvuðsheitum fevnir arbeiðsøkið um at:
- gera kostnaðarmetingar og eftirkalkulatiónir av asfalt- og anlegsarbeiðum
- skipa fyri viðlíkahaldi av skervverkunum kring landið og asfaltverkinum í Hundsarabotni

**Førleikakrøv**
Tú hevur útbúgving sum verkfrøðingur ella byggifrøðingur og hevur áhuga í at arbeiða við KT. Stórur dentur verður lagdur á góðar persónligar eginleikar so sum góð samstarvsevni, sjálvstøðugt arbeiðslag, teldukunnleika á brúkarastigi, framfýsni og evni at menna arbeiðsplássið saman við starvsfeløgunum.

**Setanarviðurskifti**
Løn og setanartreytir annars eru sambært sáttmálanum ímillum Fíggjarmálaráðið og avvarandi yrkisfelag.

**Umsóknir**
Umsóknir við prógvum og lívsgongdarlýsing (CV) verða at senda til lv@lv.fo ella:

Landsverk,
Postmoga 78,
FO-110 Tórshavn,

og skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 25. mars 2008. Merk umsóknina „starv á framleiðsludeildini“ og viðmerk í umsóknini, hvar tú hevur sæð starvslýsingina. Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

**Fleiri upplýsingar**
Fleiri upplýsingar um starvið fáast við at ringja til Torkil Olsen, deildarleiðara, telefon 540 841, ella umvegis teldupost á to@lv.fo.



SENDISTOVAN

*Landsverk er stovnur undir Vinnumálaráðnum og hevur um hendi vega- og havnamyndugleikauppgávur og byggiharrauppgávur. Stovnurin ráðleggur og ger ætlanir, útinnir, rekur og viðlíkaheldur landsvegir, havnir, bygningar og flogvallamál, herundir tyrlupallar.*

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, Tórshavn, | Tel 340 800, Faks 340 801, lv@lv.fo, www.landsverk.fo

LANDSVERK byggir land